# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Er málið ferðslutrygd?

Nú um dagarnar varð broyting gjørd í ferðslulóg, sum hevur við sær, at fær tú fleiri klipp í koyrikort, skal tú uppaftur til koyriroynd. Spurningurin er: ber til at ávísa, at trygdin fer upp, og talið av óhappum fellir, tá man skal upp til vegleiðandi koyriroynd eftir eitt brot á ferðslulógina? Tey fólkini, sum hava rent á við at hava koyrt út fyri hávatenn ella hava fingið treytaða frádøming fyri at hava koyrt 120 km/t, tey hava neyvan gjørt hesar feilir, tí tey ikki kenna ferðslureglarnar. Øll vita hvat ferðmarkið er, og at ein ikki eigur at koyra út fyri hávatenn - tað er valla har trupulleikin liggur. Tey hava bara verið óansin akkurát tá óhappið hendi, ella hava tey koyrt ov skjótt við vilja. Spurningurin er, um ein koyriroynd ger til ella frá. Ber til at ávísa, at ferðslutrygdin batnar við at koyra fólk upp til vegleiðandi koyriroynd? Ein persónur, ið rennir á við at koyra út fyri hávatenn, hevur ivaleyst fingið bestu áminning um, at hann eigur at steðga við hesar hávatenn – óivað nógv betri áminning, enn nøkur eftiransandi roynd kann geva.

Eru vegleiðandi koyriroyndir besta nýtslan av ressoursum? Er ikki onkur betur máti at brúka pengar uppá fyri at bøta um ferðslutrygdina? Ein koyriroynd í dag er ikki sum at siga tað hjá nógvum - serliga eldri - fólki, ið oftani ikki skilja málið í koyriroyndunum. At man ikki skilir málið í koyriroyndunum, nýtist ikki at merkja, at viðkomandi ikki dugir at koyra bil. Endamálið við einari koyriroynd má vera at síggja, um viðkomandi dugir ferðslureglarnar, og ikki um viðkomandi dugir, mangan toluliga nýuppfunnin orð, sum føroyingar ikki brúka í dagligari talu.Er nakar munur á ferðslutrygdini í londum, har koyriroyndirnar eru torførar, sum t.d. Danmark, og so londum, har royndirnar eru eitt sindur lættari, sum t.d.í Bretlandi?

Ein og hvør broyting í ferðslulógini má hava til endamáls at økja um trygdina og at seta inn, har tørvurin er størstur. Spurningurin er, um besta loysnin er at krevja fólk upp til eftiransandi koyriroyndir. Spurningurin er eisini, hvussu man tryggjar ferðslutrygd á besta og, fyri borgaran, einfaldasta hátt. Tað er møguligt, at man heldur seg hava gjørt hetta við seinastu broytingunum í ferðslulógini, men í hvussu so er, so eigur spurningurin at vera vendur, um hetta, sum nú er gjørt, er besti og effektivasti mátin. Kundi man t.d. heldur fokuserað nógv meira uppá tey 18 ára gomlu, sum fáa koyrikortið fyrstu ferð, heldur enn at víðka skipanina við klippikorti og eftiransandi koyriroyndum?

**Sosialurin**

## Eg eri eitt nummar



**BILL JUSTINUSSEN**
løgtingsmaður og limur í Rættarnevndini

Lógaruppskot landsstýrisins um fólkayvirlit ljóðar soleiðis í fyrstu grein, sum umrøður sjálvt endamálið við lógini:

*§ 1. Lógin hevur til endamáls at tryggja, at*
*1) øll, ið § 3, stk. 1 fevnir um, hava eitt persónstal,*
*2) Landsfólkayvirlitið goymir grundleggjandi persónsupplýsingar um hvønn einstakan, ið hevur eitt persónstal.*

Sostatt hevur landsstýrismaðurin hjá Fólkaflokkinum endaliga fingið Løgtingið at staðfesta P-talið í sjálvari lógini um fólkayvirlit. Hóast landsfólkayvirlitið hevur brúkt P-talið sum eyðkenni í mong ár, hevur hetta verið gjørt uttan lógaráseting. Tað er í sjálvum sær ein trygd fyri, at land okkara hevur eitt rímiligt fyrivarni, tá umræður rættin hjá hinum einstaka at vera meira enn bert eitt nummar í tilveruni. Men nú vildi landsstýrismaðurin ikki longur, nú skuldi P-talið og nýtslan av hesum sláast rimmarfast í lógarverkinum. Fylgjurnar kunnu, um illa vil til, vera álvarsligar. Sum limur í Rættarnevnd Løgtingsins havi eg tí lagt fyri Løgtingið uppskot um broyting í lógini um fólkayvirlit, har P-talið er tikið burtur úr uppskotinum, meðan tað, sum uppskotið í veruleikanum eigur at snúgva seg um, verður høvuðsinnihaldið. Tá broytingaruppskotið ikki fekk nakra umrøðu á tingi seint mánakvøldið 30. apríl, fari eg at loyva mær at gera vart við støðu mína í hesum lesarabrævi.

Ein minniluti í nevndini (Bill Justinussen) heldur, at lógin í alt ov stóran mun snýr seg um at staðfesta og rættvísgera nýtsluna av persónstalinum í almenna kervinum. Longu í endamálsorðingini verður staðfest soljóðandi:

Persónstalið er reyði tráðurin ígjøgnum alt uppskotið og í viðmerkingunum. Persónstalið er nevnt heilar 26 ferðir í sjálvum lógaruppskotinum og heilar 80 ferðir í viðmerkingunum. Minnilutin heldur, at tað kann ikki vera eitt endamál í sjálvum sær at eyðmerkja hvønn einasta føroying við einum persónstali. Við atliti at fólkatalinum er tað undrunarsamt, at tað ikki ber til at finna fram til røttu viðkomandi við vanligum adressuupplýsingum, tá tað í stórum londum við milliónatali av íbúgvum ber til at liva uttan persónstal. Og serliga við framkomnu tøknini í huga, átti tað at verið eitt spæl at skrásett persónar uttan nýtslu av persónstali og uttan mistøk.

Eins og minnilutin undrast Hagstova Føroya eisini á tunnu endamálsorðingina. Hagstovan viðmerkir m.a., at endamálsorðingin ikki er nóg breið og eigur at staðfesta endamálið við sjálvari skránni heldur enn bara endamálið við p-talinum.

Fyri nøkrum árum síðani var drúgt orðaskifti í Føroyum um nýtsluna av persónstalinum. Ungdómur, sum umboðaði flokkin hjá núsitandi landsstýrismanni, savnaði inn yvir 9.000 undirskriftir fyri at mótmæla tvungnu nýtsluni av P-talinum í bankum og í skattaspurningum. Tó hevur almenni myndugleikin síðani í eini líðandi gongd miðvíst útbygt nýtsluna av P-talinum. Um hendan lógin verður samtykt, er alt undirstøðukervið fyrireikað til tess at tryggja eina umfatandi samankoyring av persónligum upplýsingum í almenna kervinum. Samankoyring av persónsupplýsingum er eitt sera viðkvæmt mál, og kann eftir minnilutans meting lættliga gera seg inn á persónliga frælsið. Grundleggjandi átti almenni myndugleikin at havt persónstalið sum eitt tænastutilboð og ikki sum eina tvungna skipan. Tað kann hugsast, at nøkur eru í samfelagnum, sum ikki hava áhuga í at vera skrásett úr enda í annan við einum felags persónstali sum lykli. Hesi verða tvungin at vera partur av skipanini uttan frælsi til at velja hendan møguleikan frá.

Flestum kunnugt vóru milliónir av fólki vegna sín uppruna eirindaleyst tikin av døgum undir seinna heimsbardaga. Sagt verður, at ein av høvuðsorsøkunum til effektivu útreinsanina var, at almennu skráirnar vóru væl og neyvt skipaðar, og tí bar til at finna fram til teirra, sum skuldu forfylgjast. Vit liva sjálvsagt langt frá tí veruleikanum, men eingin veit um dagin í morgin, og hvønn veg samfelagið flytur seg. Tí eigur politiska skipanin ongantíð at lóggeva bara við verandi samfelagi sum grundarlagi, men eigur eisini at síggja inn í framtíðina við søguni sum lærumeistara. Tað gera vit ikki við hesum uppskoti.

Uppskotið kann, um illa vil til, gera seg inn á persónliga frælsið, og tí eigur persónstalið ikki at vera berandi bulurin í uppskotinum. Tað eigur at bera til at vera føroyingur og nokta at fáa eitt persónstal smoygt um hálsin longu frá føðingini. Eingin skipan er so góð, at hon ikki kann misnýtast, og tí tekur Miðflokkurin frástøðu frá við lóg at staðfesta persónstalið sum lykilin til almennar hurðar í framtíðini.

At bakka aftur til tíðina áðrenn persónstalið verður trupult, men her og nú ber til at lóggeva um fólkayvirlit uttan at staðfesta nýtsluna og kravið um persónstal við lóg. So hava vit ikki fullkomiliga slept endanum, men halda hóvliga aftur til frama fyri persónliga frælsið.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Eyðhild Jacobsen eydhild@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.